

*Fram hevur trupla uppgávu, tá teir á heimavølli taka ímóti Mjølnir*

# Toppdystir á Kambsdali og í Hoyvík

**Sørvingar fara á vitjan á Kambsdali, har nýggja oddaliðið tekur ímóti, og í Hoyvík skal KÍF royna at halda fast, nú Mjølnir kemur á vitjan**

FLOGBÓLTUR
*FBF*

Eftir eina góða byrjan upp á kappingarárið, hava teir seinastu dystirnir hjá KÍF verið ein long mótbrekka, og liðið hevur havt trupulleikar við at klára seg ímóti hinum liðunum, og hevur tap allar teir seinastu dystirnar. Skal gongdin vendast, er neyðugt at liðið fær ein sigur leygardagin, men mótstøðan er ikki hvør sum helst. Eitt vælkoyrandi lið úr Mjølni, sum eisini var liðið, ið steðgaði kollfirðingunum fyrr í ár, so einki er at ivast í, at tað verður tungt hjá KÍF.

Dagin eftir spælir TB í Havn móti Fleyr. Á pappírinum er einki at ivast í, at tvørakvinnurnar eru favorittar, og alt annað enn ein tryggur sigur til tær vil eisini vera ein sensatión av teimum heilt stóru.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum verður á Kambsdali sunnudagin, tá Dráttur vitjar hjá meistarunum. Liðini hava ikki leikt ímóti hvørjum øðrum higartil í kappingini, so spennandi verður at síggja, hvat av teimum verður omaná eftir dystin sunnudagin. ÍF hevur higartil í kappingini havt trupulleikar við at finna meistaraspælið fram frá seinasta ári, meðan Dráttur harafturímóti hevur byrja betri enn seinasta ár. Men hetta verður uttan iva ein dystur, har úrslitið ikki er avgjørt fyrr enn seinasti bóltu er leiktur.

### Brak á Kambsdali

Hjá monnunum eru tveir dystir á skránni. Leygardagin tekur Fram ímóti Mjølnir, og tó at klaksvíkingarnir júst hava tapt sín fyrsta dyst, so mugu teir roknast sum favorittar her. Fram hevur higartil í kappingini bert fingið ein sigur til høldar, og var hesin móti botnliðinum, Fleyr. Skal Fram framvegis gera sær vónir at venda gongdini og hava eitt bein innanfyri heiðurmerkjini, er tíð upp á at fáa nøkur fleiri stig í skjáttuna. Liðið hevur leikt onkran tættan dyst, t.d. ímóti SÍ, men gjørdist ov stuttir í avgerandi løtuni. Mjølnir harafturímóti hevur sum nevnt havt eitt gott kappingarár, og hevur tí uttan iva styrkina til at geva Fram ein truplan dyst.

Seinasti dysturin er á Kambsdali, har SÍ kemur á vitjan, og hetta líkist einum sonnum braki. Seinast liðini leiktu, gjørdist úrslitið ein 3-2 sigur til ÍF, meðan t.d. SÍ vann finaluna í FK-steypakappingini 3-1. Síðani seinasta dyst hevur ÍF harumframt styrkt sær um liðið við einum útlendingi afturat, og harafturat hevur SÍ higartil ikki havt tey góðu úrslitini á Kambsdali, tí liðið hevur ikki heinta nógv stig har á leiðini. Fyri at halda fast í ÍF og Mjølni, er næstan neyðugt, at SÍ vinnur dystin leygardagin, men ÍF gevur ikki nakað ókeypis.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 178 | 133 | 45 | 11 |
| 2 VÍF | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 180 | 153 | 27 | 11 |
| 3 VB | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 163 | 127 | 36 | 10 |
| 4 StÍF | 7 | 4 | - | 1 | - | 2 | 174 | 166 | 8 | 9 |
| 5 Neistin | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 190 | 166 | 24 | 7 |
| 6 Søljan | 9 | 1 | - | 0 | - | 8 | 153 | 214 | -61 | 2 |
| 7 Kyndil | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 126 | 205 | -79 | 2 |

1. Deild menn

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Kyndil | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 171 | 170 | 1 | 9 |
| 2 Neistin | 6 | 3 | - | 2 | - | 1 | 173 | 150 | 23 | 8 |
| 3 StÍF | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 151 | 142 | 9 | 8 |
| 4 VÍF | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 154 | 147 | 7 | 5 |
| 5 H71 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 143 | 158 | -15 | 3 |
| 6 KÍF | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 142 | 167 | -25 | 3 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 7 | 5 | - | 2 | 18 | 6 | 12 | 10 |
| 2 Mjølnir | 7 | 5 | - | 2 | 16 | 8 | 8 | 10 |
| 3 KÍF | 7 | 4 | - | 3 | 13 | 14 | -1 | 8 |
| 4 Dráttur | 6 | 3 | - | 3 | 13 | 12 | 1 | 6 |
| 5 ÍF | 6 | 2 | - | 4 | 7 | 12 | -5 | 4 |
| 6 Fleyr | 7 | 1 | - | 6 | 5 | 20 | -15 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 6 | 5 | - | 1 | 15 | 5 | 10 | 10 |
| 2 Mjølnir | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 3 | 9 | 8 |
| 3 SÍ | 6 | 4 | - | 2 | 14 | 8 | 6 | 8 |
| 4 Fram | 5 | 1 | - | 4 | 5 | 13 | -8 | 2 |
| 5 Fleyr | 6 | 0 | - | 6 | 1 | 18 | -17 | 0 |

# Brøndby heldur fram á sigurskósini

**Hóast teir høvdu fleiri gyltar møguleikar, so megnaðu FCK álopsspælararnir ikki at syrgja fyri málunum, sum kundu havt við sær, at FCK framvegis var við í UEFA Cup, har Brøndby eitt sindur óvæntað framvegis eigur pláss**

UEFA CUP
*Jóannes Hansen*

Tað eru tveir føroyskir spælarar í donsku superliguni. Felags fyri Toda Jónsson í FCK og Jón Róa Jacobsen í Brøndby er, at teir eru skaddir. Tað er eisini felags fyri feløgini hjá teimum báðum, at tey hóskvøldið stríddust fyri lívinum í UEFA Cup. Hjá FCK eydnaðist tað ikki at halda vetrarfrí sum partur av UEFA Cup. Tað gjørdi tað hjá Brøndby.

FCK var á Mallorca, har teir skuldu royna at vinna tað aftur, sum teir mistu á heimavølli, tá ið Mallorca í Parkini fyri trimum vikum síðani vann 2-1. Úrslitið hóskvøldið var frægari, men tað var ikki nóg gott. Mallorca legði seg á odda, men fimm minuttir undan dystarenda stútaði miðverjin Martin Albrechtsen, sum eisini skoraði FCK málið í Parkini, til 1-1. So var møguleikin fyri FCK sigri har. Zuma og Santos høvdu góðar møguleikar, men teir fingu ikki mál.

Mallorca hevði fleiri eykaspælarar á liðnum. Teir undirmettu FCK, men teir vórðu ikki sektaðir fyri tað. FCK hevði møguleikarnar, men teir megnaðu ikki at umseta til mál og harvið framhaldandi luttøku í UEFA Cup.

### Framúr hjá Brøndby

Fleiri enn 25.000 áskoðarar vóru hóskvøldið í Brøndby. Lagið á teimum var í toppi. Eftir stríðið í Gelsenkirchen var Brøndby aftanfyri 2-1. Á heimavølli vunnu teir 2-1. So var neyðugt við longdari leiktíð. Tá var danska liðið illa fyri. Men teir hóraðu undan, og í brotssparkskappingini vunnu teir 3-1. Brøndby málverjin, Karim Zaza, var framúr. Sjálvur helt hann seg ikki hava spælt so væl áður. Bæði í vanligu leiktíðini og ikki minst í brotssparkskappingini, tá ið hann tvær ferðir bjargaði royndum hjá mótstøðumonnunum.

Ebbe Sand var á beinkinum hjá Schalke 04. Hann varð skiftur inn til longdu leiktíðina. Hann royndi at arbeiða, men honum eydnaðist ikki at skjóta mál. Tað hevur hann ikki megnað í einar tríggjar mánaðir.

Í Brøndby vita teir ikki, hvørjum beini teir skulu standa á. Unga liðið hjá Michael Laudrup og John Faxe Jensen hevur ment seg uppaftur skjótari, enn tað frammanundan varð roknað við. Hóskvøldið var spælið einki at reypa av. Men teir stríddust, og tað var nóg mikið til samlaðan sigur. Tað fer at hava við sær, at Brøndby verður væl fyri í vár. Bæði til UEFA Cup kappingina og til stríðið um DM heitið, sum teir framvegis eru nógv besta boðið at vinna.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**
30.11 14.30 VÍF-Stjørnan
30.11 14.30 Kyndil-VB
30.11 15.00 StÍF-Neistin

**1. deild menn**
30.11 16.00 VÍF-StÍF
30.11 16.00 H71-Neistin
30.11 16.00 Kyndil-KÍF

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**
29.11 14.00 KÍF-Mjølnir
30.11 14.00 ÍF-Dráttur
30.11 14.00 Fleyr-TB

**Meistaradeild menn**
29.11 16.00 Fram-Mjølnir
30.11 16.00 ÍF-SÍ




VESTMANNA KOMMUNA

# Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi til útibarnagarðin Látipípuna í Vestmanna at byrja 5. januar 2004 ella eftir avtalu.

**Stovnslýsing:**
Látipípan er ein grønur stovnur, har vit m.a. læra børnini at virða og fara væl um náttúruna.

Í stovninum ganga 25 børn í aldrinum 5-7 ár, nøkur eru 1/2 tíð aðru hvørja viku.

**Starvið:**
Starvið er 40 tímar um vikuna. Arbeiðstíðin er skiftandi ímillum kl. 7.30 og 17.15.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú tímir væl at vera uttandura
- at tú tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- at tú sært møguleikarnar fram um avmarkingarnar

**Lønarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður hjálparfólk sett í staðin.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Malan Stórá, leiðara, tlf. 424130 ella 229108.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. desember 2003.

**Vestmanna kommuna**

# Húsavørður søkist

**Hjálp.... Okkara fitti húsavørður gevst at arbeiða hjá okkum, og tískil hava vit brúk fyri einum øðrum fittum húsavørði at starvast hjá okkum frá 1. februar 2004.**

Í Sankta Jósefs barnagarði er eitt starv sum húsavørður leyst at søkja 25 tímar um vikuna. At starvast sum húsavørður í einum barnagarði er eitt sera fjølbroytt og spennandi starv.

Arbeiðsuppgávurnar eru fjølbroyttar. Ein av uppgávunum er at halda økið kring barnagarðin viðlíka og annars alt fyrifallandi arbeiði. Vit vænta av umsøkjaranum, at hann er tolin og góður við børn.

Um hetta hevur tín áhuga, so eru tygum vælkomin at søkja starvið. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Louisu Smets, leiðara, á tlf. 312854.

**Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. desember 2003 og sendast til:**

**Sanda Jósefs Barnagarður**
Att. Louisa Smets
Varðagøta 12
100 Tórshavn

**Hyundai Sonata 2.0 bensin**




- Myrkagráur
- Árgang 2002
- Km. 32.000
- El-rútar
- Klimaanlegg v.m.
- Hita í setrunum
- Sera vælhildin

Sosialurin 341800

**Ford Mondeo 1.8 TD Stationcar**

- Árgang des 1998
- Km. 130.000
- Krók · Tokulyktir
- El-rútar
- Klimaanlegg
- CD spælara við 6 fløgum
- Hiti í forrútinum
- Hiti í forsetrum · 4 nýggj heilársdekk á felgum og summardekk á sportfelgum fylgja við · Vælhildin




**Rexton RX290 4x4 nýggjur**



- Mercedes motorur
- 2.9 litur
- Aircondition
- El-rútar v.m.

Vørubilur, prísir úr 238.648,- v/mvg
Persónbilur, prísir úr 311.190,- v/mvg

**Galloper Innovation 2.5 TD Intercooler**

- Gráur metalllakk
- Árgang 1999
- Km. 95.000
- 5 setur · Aircondition
- Altimetur · El-spegl
- El-rútar framman
- Hita í setrum
- Tokulyktir
- Lættmetalfelgur við heilársdekkum
- Summardekk fylgja við
- Vælhildin




**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

# Til sølu



**Toyota Carina E 2.0 Gli 133 hk**

Árg. juli 1996. Koyrt 125.000.

17" sportfelgur 215/40 dekk, Kenwood fløguspælara. Til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 220071 ella 757087**

# Fulltrúi í Løgtinginum

Í umsiting Løgtingsins er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja.

Arbeiðsuppgávurvnar hjá fulltrúanum verða hesar:
- Nevndarskrivari og løgfrøðiligur ráðgevi í 3 tingnevndum
- Eftirkanna lógaruppskot og vera løgfrøðiligur ráðgevi hjá flokkum og tingmonnum í málum, sum natúrliga hoyra til omanfyrinevndu nevndir
- At luttaka í vanligari málsviðgerð í umsiting Løgtingsins, og eru uppgávur hennara í stuttum hesar:
  - at taka sær av øllum umsitingarligum uppgávum Løgtingsins
  - at vera ráðgevi hjá Løgtingi og løgtingsnevndum í øllum løgfrøðiligum spurningum, herundir at ansa eftir, at øll mál eru løgfrøðiliga og málsliga røtt
  - at røkja skrivarauppgávur í Løgtinginum og løgtingsnevndum
  - at taka sær av skrivarauppgávum hjá Løgtingsins sendinevndum í Norðurlandaráðnum og Útnorðurráðnum

Í umsiting Løgtingsins arbeiða í løtuni 9 fólk, harav 2 løgfrøðingar.

Ynskiligt er, at tann, sum settur verður, hevur lokið prógv í løgfrøði, men fólk við aðrari útbúgving kunnu eisini søkja. Tann, ið settur verður, skal hava áhuga fyri politiskum og samfelagsligum viðurskiftum.

Fólk, sum hava lokið útbúgving í summar ella vænta at verða liðug í januar, eru vælkomin at søkja.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og BLF ella avvarðandi yrkisfelag.

Tann, sum settur verður, má tola broytingar í arbeiðsuppgávunum.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Løgtingið, telefon 311000, Súsonnu Danielsen, stjóra.

Umsóknir saman við prógvum, frágreiðing um størv frammanundan og møgulig ummæli skulu vera umsiting Løgtingsins, Tinghúsvegi 1-3, Postboks 208, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. desember 2003 kl. 16.00.

**Løgtingið**
tann 26. november 2003

# NÁTT-BUSSURIN

**hjá Øssuri Christiansen**

***Koyrt verður leygarkvøld:***

**Vágaleiðin *(tlf. 217753)***
- Úr Vágunum — *bert eftir avtalu*
- Tórshavn - Vágar — kl. 04.30

**Vestmannaleiðin *(tlf. 217752)***
- Vestmanna - Tórshavn — kl. 23.30
- Tórshavn - Vestmanna — kl. 00.30
- Vestmanna - Tórshavn — kl. 03.30
- Tórshavn - Vestmanna — kl. 04.30

**(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)**

**Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu**



***Tlf. 424254***